INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

4. juli 2011
Mál: 11/00366-11
Tygara skriv:
Málsviðgerð: PL

**Uppskot til hoyringar í sambandi við kommunala umskipan**

Í sambandi við arbeiði at skipa føroysku kommunurnar í færri eindir og at leggja eldrarøktina út til kommunurnar at umsita, verða hjáløgdu lógaruppskot, uppskot til samtyktar og uppskot til fígging av eldrarøktini send tykkum til hoyringar.

Uppskotini eru:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur (Innlendismálaráðið)
- Uppskot til samtyktar um at leggja eldraøkið til kommunurnar at umsita (Almannamálaráðið)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg (Almannamálaráðið)
- Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um eldrarøkt í Sandoynni (Almannamálaráðið)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Heimasjúkrasystratænastu (Almannamálaráðið)
- Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um uppihald á stovni o.l. (Almannamálaráðið)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (Almannamálaráðið)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Almannamálaráðið)
- Uppskot um fígging av eldrarøktini í sambandi við, at økið skal leggjast til kommunurnar tann 1. januar 2014 (Fíggjarmálaráðið)

Eitt samlað hoyringssvar skal verða Innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. juli 2011.

Uppskotini eru send báðum kommunufeløgunum eins og øllum kommununum til hoyringar.

Vegna Innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo